

## Skúlastýrini í Klaksvík vald

Samstundis, sum fólk valdu fólk í kommununa í Klaksvík, skuldu foreldrini at børnum í báðum skúlunum í Klaksvík, eisini velja til skúlastýrini. Til skúlan á Ziskatrøð vóru 366 fólk og valdu. Hesi avgjørdu, at Ella Heinesen við 114 atkvøðum, Martina Hansen við 68 atkvøðum og Eyð Matras við 59 atkvøðum næstu fýra árini skulu vera umboðini hjá foreldrunum í skúlastýrinum hjá skúlanum á Ziskatrøð. Eykafólk eru Magnus Arge og Ingrid Eysturdal. Øll í umboðini eru vald á fyrsta sinni. Í skúlanum við Ósánna vóru 339 foreldur á valið. Mariann Fuglø er toppskorari við 85 atkvøðum, henni næst eru, Símun Gullaksen og Karl Birgir Isaksen, við ávikavist 79 og 69 atkvøðum. Tiltakslimir eru Edna Reginsdóttir og Sólfríð Jakobsen. Í ymisku skúlastýrunum eru eisini umboð fyri lærararnar og umboð fyri kommununa.

## Føroya Banki er ikki eitt reiðarí

VINNULÍV

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað var Føroya Banki, sum í gjár keypti tey seks skipini hjá Jóhan Páll Joensen. Men tað er ikki ætlanin at halda uppá skipini.

- Vit fara nú at royna at selja skipini. Vit keyptu tey tí at vit eru pantahavarar í skipunum og vilja hava sum best burturúr, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.

Sambært stjóranum eru allir keyparar í somu skóm.

- Tað eru fleiri, ið hava áhuga í at keypa skipini. Vit fara at fáa sum mest burturúr, og tað ger, at ongin fær fortrinsrættindi. Hvat annars er við virkinum spælir helst ongan leiklut, greiðir stjórin í bankanum frá. Janus Petersen leggur afturat, at teir eru í samráðingum við ymiskar partar, og eru heilt víst opnir fyri at selja skipini, tí teir dríva ein banka og ikki eitt reiðarí.



# Kósin stongir mánadagin

**Í løtuni arbeiða tey seinasta fiskin á Kósini í Klaksvík. Skipini, ið vanliga veita virkinum fisk, fóru undir hamaran í gjár. Hóast Jóhan Páll Joensen, stjóri, arbeiðir við einari loysn fyri at bjarga øllum, hevur hann ikki góðar vónir. Sostatt eru 150 fólk í stórum vanda at missa arbeiðið**

VINNULÍV

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í alla næstu viku verður onki arbeiði á Kósini í Klaksvík. Orsøkin er, at Føroya Banki í gjár keypti øll skipini, ið vanliga selja fisk til virkið. Skipini hava eisini ligið síðan mánadagin, tá møguliga seinasti fiskurin kom á Kósina á hesum sinni. So umleið 150 arbeiðsfólk liva í eini stórari óvissu.

Tað er ongin loyna, at Maru Seafood hevur flotið tungt í sjónum seinastu tíðina, og nú sær krakkið út til at vera komið.

- Tað sær onki út hjá okkum. Vit royna at samráðast við bankan um eina samlaða loysn í dag, men vónirnar eru ikki so góðar. Tað fyrsta er at fáa skipini aftur, men tað eru aðrir áhugaðir í skipunum, og eg eri heilt vísur í, at um bankin fær tað tryggari við øðrum, so velur bankin teir, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood.

### Alt fer

Maru Seafood hevur tað ikki gott í løtuni, og hóast Jóhan Páll Joensen er kendur í bankaheiminum, kennir hann seg ikki á nakran hátt tryggan.

- Tað er eitt ár síðan eg fór úr bankanum, og alt er broytt so nógv síðani tá. Bæði vinnuligu fyritreytirnar og tær fíggjarligu. Men tað er heilt víst, at um vit ikki fáa skipini aftur, so fer alt Maru Seafood í gjaldsteðg. Tað vil siga øll átta skipini og øll trý virkini fara. Tá verður talan um umleið 300 fólk, ið missa støрv síni, greiðir Jóhan Páll Joensen frá.

Hini skipini eru, línuskipini, Fugltúgvan og Grani, og virkini eru Norðís og Eystís.



*Frá mánadegnum verður onki arbeiði á Kósini í Klaksvík og óvist er, um virkið letur uppaftur í bræði*



*Jóhan Páll Joensen roynir í løtuni at samráðast við Føroya Banka og onnur, um at bjarga øllum Maru Seafood, sum eigur Kósina*

### Samráðast í dag

Føroya Banki keypti í gjár allar seks partrolararnar, ið vanliga hava selt fisk til Kósina. Skipini eru, Fjallshamar, Nónhamar, Smaragd, Safir, Navarin og Borgarin. Ongin bjóðaði ímóti bankanum og skipini fóru tilsamans fyri umleið tríggjar milliónir krónur. Hetta er bert prísurin á sjópantukrøvunum, tað er í hesum føri løn til manningina og ymisk havnargjøld. tað var væntandi alla tíðina, at Føroya Banki fór at keypa, tí bankin hevur lán útistandandi fyri 102 milliónir krónur í skipunum. Harafturat hevur bankin 25 milliónir krónur í Kósini í Klaksvík. Eisini aðrir fíggjarstovnar hava pening útistandandi hjá Maru.

### Bankin bjargar sær sjálvum

- Bankin roynir sjálvandi at fáa sum frægast burturúr, og vit fara at kanna møguleikan at sleppa at arbeiða víðari, men enn vita vit onki. Tó koma helst indikeringar seinni í dag, og so fáa vit at síggja, men tað er heilt víst, at onki arbeiði verður á Kósini alla næstu viku, og so mugu vit bara bíða og síggja hvat hendir, sigur Jóhan Páll Joensen. Sum er vísur í, at Maru ikki stendur sterkari enn so, at um bankin sær betri møguleikar við øðrum, so velur hann teir, og so fer virkið helst í gjaldsteðg.